# Foreldur í Skopun eru stevnd

**Ingun Simonsen, fyrrverandi fyrsti lærari í Skopun, hevur stevnt foreldrum í Skopun fyri »forstyrrelse og ødelæggelse af forhold«**

STEVNING
*Ingrid Bjarnastein*



*Foreldur í Skopun hava fingið boð um at møta í rættinum. Hetta er í sambandi við skúlastríðið fyri nøkrum mánaðum síðani.*

Stríðið um fyrsta læraran í Skopun er ikki endað enn.

Fyri nøkrum mánaðum síðani tók stríð seg upp í Skopun um fyrsta læraran, Ingun Simonsen, tí foreldur savnaðu saman undirskriftir, har tey kravdu at fáa betri viðurskifti fyri børn teirra í skúlanum. Hetta endaði við, at fyrsti lærarin Ingun Simonsen, fór frá og Sigurd Bærentsen eisini flutti úr skúlanum.

Nú hava 24 foreldur í Skopun fingið boð um at møta í rættinum tann 19. november klokkan 10.30.

**Nøkur pilkað frá**

Sambært foreldrunum verða tey saksøkt fyri »forstyrrelse og ødelæggelse af forhold«, og sagt verður, at foreldrini hava skyldina av, at Ingun ikki fær arbeiði nakrastaðni – hóast hon nú arbeiðir í Hoyvíkar skúla.

– Vit hava ongantíð skrivað undir, at vit vildu hava hana frá, siga foreldrini í Skopun.

– Vit skrivaðu undir uppá, at vit vildu hava frið at valda á skúlanum.

Sjálvandi vilja foreldur at alt skal fungera sum best fyri teirra børn, og tað var tað, sum vit skrivaðu undir.

Men sakførarin hjá Ingun Simonsen, Sigmund Poulsen, sigur, at foreldrini hava sagt, at um Ingun ikki fór frá sum fyrsti lærari, so tóku tey barnið úr skúlanum.

– Og tað er ein rættiliga grov ákæra, sigur Sigmund Poulsen.

24 foreldur eru stevnd, men tað vóru 27, sum hava skrivað undir brævið.

Sostatt eru trý foreldur pilkað burturúr.

– 27 foreldur skrivaðu undir brævið av fyrstan tíð, sigur Sigmund Poulsen, advokatur.

– Men tann tíð tað var, sendi eg eitt bræv til foreldrini, og tá vísti tað seg, at trý av teimum tóku undirskriftirnar aftur. Hetta varð gjørt longu í mei-juni mánaða, so tað er ikki nakað nýtt, greðir advokaturin frá.

Foreldrini siga seg ikki hava nakað ímóti at fara í rættin, tí standa fast við tað, ið sagt og gjørt er. Men tey siga seg vera kedd um, at Sigurd Bærentsen varð noyddur at fara í annað starv.

– Bæði Sigurd Bærentsen og Ingun Simonsen áttu at kunna verið her í dag, men soleiðis er tað bara ikki. Men vit standa fast við okkara. Vit hava ikki gjørt nakað galið, og tí hava vit onki ímóti at fara í rættin.

Foreldrini siga, at Ingun Simonsen metir seg verða forfylgda av foreldrunum, men foreldrini meta, at Ingun forfylgir teimum.

Sjey skjøl eru viðløgd í stevningini, og í øllum teimum sjey skjølunum hevur hon bara navngivið ein persón.

– So um nakað er forfylging, so er tað júst tað, siga foreldrini í Skopun.

– Tá foreldur í Skopun siga, at fyrsti lærarin heldur áfram við at leggja forðingar í vegin, og at tey taka barnið úr skúlanum um hon ikki fer frá, tá er tað rættiliga álvarsamt, sigur Sigmund Poulsen at enda.

# Rio Bravo letur uppaftur

**Eftir at hava verið stongt í fimm vikur, letur Rio Bravo nú uppaftur. Nakrar broytingar eru gjørdar, sigur eigarin Mouldi Manai**

MATSTOVUR
*Heini í Skorini*

Matstovan í miðbýnum í Havn, Rio Bravo, hevur seinastu vikurnar verið afturlatin. Men nú kunnu havnarfólk aftur leita sær oman í Rio Bravo, eftir at matstovan er latin uppaftur.

Mouldi Manai, eigari á Rio Bravo umframt øðrum matstovum og barrum í Havn, sigur, at nakrar broytingar eru gjørdar seinastu tíðina, bæði viðvíkjandi lokali og matarskrá.

– Vit hava gjørt tað praktiskari í lokalum okkara, bæði fyri arbeiðsfólkið og fyri kundarnar. Hesar nýggju innrættingar hava verið framdar, meðan Rio Bravo hevur verið afturlatið, og vit eru vælnøgd við broytingarnar. Umframt tað hava vit eisini víðkað matarskrá okkara, og serliga er atgongdin til fiskarættir størsta broytingin, sigur Mouldi Manai.

**Opið til kl. 3**

Mouldi Manai leggur eisini afturat, at Rio Bravo er opið frá hósdegi til sunnudag. Manhattan og Casablanca, sum eru í sama bygningi, hava opið allar dagar í vikuni, og tí er tíðarskeiðið frá hósdegi til sunnudag nøktandi at hava opið hjá Rio Bravo.

Køkurin í Rio Bravo fer at stongja umleið klokkan ellivu hvørt kvøld, men harafturímóti er nú møguleiki at sita á matstovuni til klokkan trý um náttina.

– Fyrr hevur ikki verið møguleiki at sita so leingi, men hetta geva vit kundum okkara møguleika fyri nú. Fólk vilja ofta sita og hugna sær longri, hóast køkurin er stongdur, og tey eru liðug at eta, og tí skil halda vit tað vera týdningarmikið, at fólk ikki skulu út, longu tá køkurin letur aftur.




*Rio Bravo er nú latið uppaftur eftir 5 vikur í dvala*

Bilar

Nr. 199 • hósdagur • 17. oktober 2002 • 76. árg.

# Citroën C3 - ársins bilur í Danmark 2003

**Danskir motorjournalistar hava kosið Citroën C3 til "Årets Bil i Danmark 2003". Bilurin fekk 174 stig av 575 møguligum og bleiv 33 stig frammanfyri nummar tvey.**

ÁRSINS BILUR
*Magnus Gunnarsson*

Citroën C3, ið kom á marknaðin í vár, er ein bilur við ótradionellum designi, ið verður lagdur til merkis í gøtumyndini. Upprunaliga høvdu designarnir Citroën 2CV í huga, tá teir fóru undir at tekna C3. Bilurin er lættur at koma inn í, man situr høgt við góðum útsýni. Instrumentini innan minna ikki sørt um teir gomlu Citroën GS og CX, men hesi er í nútímans smartum stíli. Bilurin er rúmiligur, hevur góðar koyrieginleikar og lutfalsliga stórt viðførisrúm, 305 litrar, ið má sigast at vera stórt í hesum klassanum.

Í donsku tíðindaskrivunum verður sagt, at fólk ikki kunnu rokna við, at tey kunnu fara inn til nærmasta Citroën bilhandlara og keypa ein nýggjan C3. Orsøkin er, at bíðilistin er langur eftir at fáa bilin leveraðan. Sama er galdandi her hjá okkum. Frá Citroën umboðnum, Ivan Johansen Bilar, verður sagt, at eftirspurningurin er stórur, og at teir ongan C3 hava á goymslu í løtuni, men teir vóna at fáa nakrar bilar um 14 dagar.




*Citroën C3 bleiv seinasta hósdag kosin "Årets Bil i Danmark 2003"*

# LandCruiser í nýggjari útgávu

**Toyota sýnir fram ein nýggjan LandCruiser á altjóða bilaframsýningini í Paris. Bilurin er designaður á evropeiska designsentrinum hjá Toyota í Suðurfraklandi**

BILAR
MAGNUS GUNNARSSON

Hesin nýggi bilurin, ið kemur at avloysa LandCruiser GX90, verður eins og forgangarin, ein ektaður "off roadari" við eins góðum eginleikum til at koyra á ósløttum undirlendi sum á vanliga koyrivegnum. Bilurin er útgjørdur við nógvari framkomnari tøkni til koyring, har tað er bratt og óframkomiligt. Hann hevur t.d. Hill-start Assist Control (HAC) og Downhill Assist Control (DAC) sum eru elektroniskar skipanir ið halda stýr á bilinum í bróttum undanbrekkum. Eisini hevur hann elektroniskt sperridifferentiali. LandCruiser verður gjørdur í útgávum við 3 og 5 hurðum. Tveir motorar verða at velja ímillum. Annar er ein 4 syl. 3,0 litur common-rail turbodiesel við 163 hk og hin er einV6 VVTi bensin við 249 hk og koyrir frá 0-100 km/t uppá 10 sek. Av trygdarútgerð kann nevnast at umframt airbag framman og í síðunum hevur hann eisini gardinairbag. Hesin LandCruiser kemur á marknaðin við 3,0 dieselmotori fyrst komandi ár og við V6 bensinmotorinum í einaferð í vár.

*Kelda: Tíðindaskriv frá Toyota Danmark A/S*




*LandCruiser er designaður á evropeiska designsentrinum hjá Toyota í Suðurfraklandi*